Reglugerð fyri kappingar undir Billardsamband Føroya.

FØROYAMEISTARAHEITIÐ FYRI LIÐ

§ 1
Vinnandi liðið av 1. deild er føroyameistari.

§ 2.
Deildirnar.
Kappast verður í trimum deildum, nevndar 1., 2., og 3. deild.
BSF leggur leikskrá og skipar kappingarnar eftir meginreglunum í hesi reglugerð.

Í 1. deild eru 6 lið. Í mesta lagi 2 lið úr sama felag
5 lið, sum gjørdust nummar 1 til 5 í 1. deild í undanfarna kappingarárið.
1 lið, sum vann 2. deild undanfarna kappingarár. Um sama felag frammanundan hevur 2 lið í deildini, so fer hesin heiður víðari til nummar 2. (Hetta er galdandi fyri allar deildurnar.)
Nummar 6 má niður í 2 deild.

Í 2. deild eru 6 lið. Í mesta lagi 2 lið úr sama felag.
4 lið sum gjørdist nummar 2 til 5, niðurflytarin úr 1. deild og liðið sum vann 3. deild í undanfarna kappingarárið.
Vinnarin av deildini flytur upp í 1 deild.
Liði sum endar nummar 6, má niður í 3. deild.

Frí tilmelding er til FM fyri lið í 3. deild. Deildin verður skipað eftir hvussu nógv lið melda seg til. Melda ov fá lið til, kann 2. og 3. deild verða lagdar saman. Tá er max 2 lið reglunin ikki í gildi meira. Vinnarin av deildini flytur upp í 2. deild.

§ 3.
Kappingin í 1,2 og 3. deild
Kappingin í deildinum verður skipað eftir hesum reglum.
6 lið luttaka.
Kappingin verður skipað, sum 10 liðdystir, har hvørt lið spælir tveir dystir móti hvørjum øðrum. Ein heima og ein úti. Eru 2 lið úr sama felag í somu deild, skulu hesir innanhýsis dystir altíð spælast í 1. og 6. umfarð.
Eru fleiri ella færri enn 6 lið, avgerð BSF hvussu kappingin skal skipast.

§ 4. Liðini.
Eitt lið í 1. deild hevur 2 spælarar. Eitt lið í 2. og 3. deild kann hava upp til 4 spælarar, (max 6. spælara kunnu hava spælt á einum liði eitt kappingarár, inkl. substituttar). Um eitt lið ikki meldar fult tal av spælarum til, áðrenn kappingin byrjar, kunnu spælarar koma afturat til talið er fult.
Spælara kunnu flyta millum deildir, tó er bert loyvt at spæla ein dyst í hvørjum umfarið. Men sístu 3. umførð er bara loyvi at flyta spælara upp.
Hevur onkur spælari ongan dyst spælt í eini kapping, kann hann fara av liðnum og á annað lið, um BSF ella kappingarleiðslan samtykkir.
Liðið skal til allar kappingar bert nýta spælarar, sum eru skrásettir á liðnum, tó við undantøkum substituttar.

§ 4.B. Dystir
1. 1. Deild spælir til 500 men max. 20 inngangir. Tá tann sum leggur út rakar 500, byrjar mótspælarin síðsta umfar við útlegg. Um 500 ikki verður nátt – tvs. at tann sum leggur út hevur spælt 20 umfør, byrjar mótspælarin 20. umfar við útlegg. Vinnarin er sjálvsagt tann við flest eygum við 20. umfar.
2. 2. Deild spælir sama leist sum 1. Deild, men tó bert upp til 300.
3. 3. Deild spælir sum vanligt 20 umfør deilt í 2 hálvleikir. Tann sum ikki legði út byrjar viðútlegg í 11. inngangi.

§ 5.
Tá nýtt kappingarár byrjar, kunnu lið umskipa seg og halda sama pláss í kappingini, sum upprunaliðið hevði. Plásssið í einari deild eigur felagið ikki spælarnir.

§ 6. Kappingin.
Kappingin verður í 1.,2. og 3. deild skipað við ,at øll lið spæla 2 ferðir móti hvørjum, ein heimadyst og ein útidyst. Heimaliði skaffar dómara og avgerð á hvørjum borðum dystir skulu spælast.

§ 7
Liðini hava skyldu til at møta til allar dystir, sum eru skipaðar í teimum ymsu deildunum.
Heimaliði skal avtalað tíð við mótstøðuliði.

§ 8
Um ikki er gjørligt hjá einum liði at møta vegna veður ella líknandi umstøður, kann dystur útsetast.
Nevndin í BSF kann um neyðugt áseta nýggja tí, um tað er neyðugt.

§ 9
Møtir lið ikki til ásettan dyst, og nóg gyldug orsøk ikki er fyri hesum, verður liðið koyrt úr kappingini.
Og spælarnir á liðnum fáa bót og spælibann restina av kappingarárinum.

§ 10
Tá lið verður koyrt úr kappingini, verða øll úrslit hjá liðnum strikað, um liðið hevur spælt móti færri enn helvtini av hinum liðunum. Hevur liðið spælt móti meira enn helvtini av liðunum, fáa tey liðini, sum eftir eru, justeraða skoru, útroknað beinanvegin, sum helvt av meðal liðið hevur vunnið, og helvt av meðal, sum onnur lið hava vunnið á tí útkoyrda liðinum.

§ 11
Møguligt er at kæra um okkurt óregluligt er áfatt. Kæra skal latast BSF í seinasta lagi 60 minuttir eftir dystin.

§ 12
Í tann mun hesar kappingarreglur ikki greiða ivaspurningar, kann verða neyðugt hjá BSF at seta greinar afturat, og tá útflýggja nýggjar kappingarreglur.

§ 13
SUBSTITUTTAR
Substituttar skulu viðurkennast av kappingarleiðsluni áðrenn dystur byrjar.
Substitutturin skal spæla dyst lidnan.

## FØROYAMEISTARAHEITIÐ FYRI EINSTAKLINGAR.

§ 1.Tilmelding.
Tað er frí tilmelding, øll sum eru limir í einum Føroyskum billardfelag kunnu verða við.

§ 2.Spælara.
8. spælara eru við í finalu umfarðinum. Teir 6. spælarnir sum hava hægsta miðal í Liðkappingini gjøgnum veturin eru beinleiðis við í kappingini. Tó skal leikari hava spælt minst 80% av dystinum, annars má hesin í innleiðandi kappingina. (Um ein meldar avboð kemur nr 7. við osv..)
Innleiðandi um tey 2. sístu plássini skulu restin av spælarnum sum melda til kappingina kappast um.Her kunnu bert 8. spælara verða við. So neyðugt kann verða at hava eina undankapping til innleiðandi kappinga. Her er somu reglur viðv. miðaltal galdandi sum í finalu umfarðinum.

§ 3.Kappingin.

Kappast verður  í 2. bólkum. Bólkur 1. leikara nr. 1,4,5 og 8. Bólkur 2. leikara nr. 2,3,6 og 7. frá vetrakappingini og kval..Spælt verður um stig. Nr. 1. og 2. í hvørjum bólkið koma víðari í semifinalurnar. Vinnarnir av semifinalinum koma í finaluna og taparnir spæla um 3. pláss.

§4.Vinnarin av kappingini er Føroya Meistari í Billard.